**Danska superligan**

| | | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | FCK | 24 | 12 | - | 7 | - | 5 | 34 | 25 | 9 | 43 |
| 2 | Brøndby (M) | 24 | 11 | - | 8 | - | 5 | 45 | 25 | 20 | 41 |
| 3 | Farum | 23 | 12 | - | 2 | - | 9 | 36 | 40 | -4 | 38 |
| 4 | FCM | 24 | 9 | - | 8 | - | 7 | 36 | 30 | 6 | 35 |
| 5 | Esbjerg | 24 | 9 | - | 7 | - | 8 | 47 | 46 | 1 | 34 |
| 6 | OB (S) | 24 | 8 | - | 9 | - | 7 | 39 | 33 | 6 | 33 |
| 7 | AaB | 24 | 10 | - | 3 | - | 11 | 31 | 33 | -2 | 33 |
| 8 | AB | 24 | 7 | - | 8 | - | 9 | 31 | 33 | -2 | 29 |
| 9 | Silkeborg | 24 | 7 | - | 7 | - | 10 | 33 | 35 | -2 | 28 |
| 10 | Viborg | 24 | 6 | - | 8 | - | 10 | 38 | 43 | -5 | 26 |
| 11 | AGF | 23 | 7 | - | 5 | - | 11 | 33 | 45 | -12 | 26 |
| 12 | Køge | 24 | 8 | - | 2 | - | 14 | 37 | 52 | -15 | 26 |

*Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK), Jón Rói Jacobsen (Brøndby)*

**Danska 1. deild**

| | | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Herfølge | 21 | 16 | - | 2 | - | 3 | 50 | 24 | 26 | 50 |
| 2 | Frem | 21 | 13 | - | 4 | - | 4 | 48 | 28 | 20 | 43 |
| 3 | Vejle | 21 | 11 | - | 4 | - | 6 | 41 | 33 | 8 | 37 |
| 4 | Fredericia | 21 | 10 | - | 6 | - | 5 | 31 | 17 | 14 | 36 |
| 5 | Skjold | 21 | 10 | - | 4 | - | 7 | 38 | 23 | 15 | 34 |
| 6 | HFK Sønderj. | 21 | 8 | - | 6 | - | 7 | 42 | 39 | 3 | 30 |
| 7 | Randers F. | 21 | 9 | - | 3 | - | 9 | 38 | 37 | 1 | 30 |
| 8 | Ølstykke | 21 | 7 | - | 7 | - | 7 | 43 | 42 | 1 | 28 |
| 9 | Brønshøj | 21 | 7 | - | 4 | - | 10 | 27 | 29 | -2 | 25 |
| 10 | FC Aarhus | 21 | 7 | - | 3 | - | 11 | 32 | 38 | -6 | 24 |
| 11 | B 93 | 21 | 6 | - | 5 | - | 10 | 28 | 34 | -6 | 23 |
| 12 | B 1913 | 21 | 6 | - | 5 | - | 10 | 27 | 41 | -14 | 23 |
| 13 | Hvidovre | 21 | 6 | - | 5 | - | 10 | 25 | 40 | -15 | 23 |
| 14 | AC Horsens | 21 | 5 | - | 7 | - | 9 | 29 | 36 | -7 | 22 |
| 15 | B 1909 | 21 | 4 | - | 7 | - | 10 | 34 | 49 | -15 | 19 |
| 16 | HIK | 21 | 5 | - | 4 | - | 12 | 26 | 50 | -24 | 19 |

*Føroyskir leikarar: Christian Høgni Jacobsen (Vejle), Atli Greg-ersen (Randers Freja), Johan Byrial Hansen (AC Horsens), Óli Johannesen (Hvidovre), John Heri Dam (Hvidovre)*

**Norska tippeligan**

| | | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Sogndal | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 3 | 1 | 2 | 6 |
| 2 | Viking | 2 | 1 | - | 1 | - | 0 | 5 | 2 | 3 | 4 |
| 3 | Tromsø | 2 | 1 | - | 1 | - | 0 | 5 | 4 | 1 | 4 |
| 4 | Molde | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 4 | 1 | 3 | 3 |
| 5 | Stabæk | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 5 | 3 | 2 | 3 |
| 6 | Vålerenga | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 3 | 2 | 1 | 3 |
| 7 | Rosenborg | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 1 | 0 | 1 | 3 |
| 8 | Bodø/Glimt | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 3 | 3 | 0 | 3 |
| 9 | Odd Grenland | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 2 | 4 | -2 | 3 |
| 10 | Lillestrøm | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 1 | 4 | -3 | 3 |
| 11 | Brann | 1 | 0 | - | 1 | - | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 |
| 12 | Lyn | 2 | 0 | - | 1 | - | 1 | 2 | 3 | -1 | 1 |
| 13 | Aalesund | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 3 | 6 | -3 | 0 |
| 14 | Bryne | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 0 | 4 | -4 | 0 |

*Føroyskir leikarar: Jákup Mikkelsen (Molde)*

**Súkkling-landsliðsúttøka**

**100 km**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Bogi Kristiansen | 2.59,30 |
| 2 | Gunnar Dahl Olsen | 2.59,35 |
| 3 | Sverri Mohr Edvinsson | 3.01,55 |
| 4 | Eli Christiansen | 3.16,14 |
| 5 | Beinur Rasmussen | 3.20,33 |
| 6 | Jens Sigurð Simonsen (koyrdi skeivt) | 3.16,14 |
| | Hans Krosstein (punkteraði) | |

**50 km**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Sverri Mohr Edvinsson | 1.21,48 |
| 2 | Gunnar Dahl Olsen | 1.22,28 |
| 3 | Bogi Kristiansen | 1.29,54 |
| 4 | Beinur Rasmussen | 1.30,32 |
| 5 | Eli Christiansen | 1.30,32 |
| 6 | Eyðtór Joensen | 1.38,39 |
| 7 | Jens Sigurð Simonsen | 1.41,16 |
| 8 | Evald Rasmussen | 1.41,37 |
| 9 | Hans Krosstein | 1.44,21 |
| 10 | Bergur Johansen | 1.50,29 |
| 11 | Dánjal Michaelsen | 1.55,10 |

**Býarkoyring** (50 min+1 umgang)

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Bogi Kristiansen | 49 |
| 2 | Gunnar Dahl Olsen | 49 |
| 3 | Eli Christiansen | 48 |
| 4 | Sverri Mohr Edvinsson | 47 |
| 5 | Jens Sigurð Simonsen | 42 |
| 6 | Hans Krosstein | 42 |
| 7 | Beinur Rasmussen | 42 |

# Hjalgrím venur í Malaga

**Spanska felagið hevur júst endurskipað alt ungdómsarbeiðið, og eftir venjingarleguna hjá A-landsliðnum í Spania, halda teir seg síggja møguleikar í unga klaksvíkinginum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Hjalgrím Elttør er í løtuni á Sponsku suðurstrondini, har hann venur við talentliðnum hjá Malaga*

Ein av teimum ungu føroysku fótbóltsleikarunum, sum ofta hevur verið settur í samband við útlendsk feløg, er klaksvíkingurin, Hjalgrím Elttør.

Eitt nú hevur hann áður verið í Onglandi til royndarvenjingar, og í hesum døgum er hann undir sponsku sólini, har hann venur saman við talenthópinum hjá Malaga.

Við á ferðini er eisini umboðsmaðurin hjá Hjalgrím, Jákup í Stórustovu, og hann váttar eisini, at talan er um veruligan áhuga hjá spanska felagnum.

- Hetta kom soleiðis spakuliga upp í lag, tá føroyska A-landsliðið var á venjingarlegu fyrr í ár. Hendan var nærhendis Malaga, og her vóru umboð hjá felagnum og hugdu at nøkrum av teimum leikarunum, sum vóru á venjingarlegu við feløgum sínum.

- Malaga hevur júst endurskipað allan ungdómspolitikkin, og akkurát í hesum førinum kann tað vera ein fyrimunur fyri Hjalgrím. Tað er nevnliga ikki so, at teir nú vilja hana ein ungan leikara, sum kann fara beinleiðis inn á besta liðið, men hinvegin eru teir í ferð við at uppbyggja eitt talentlið við leikarum, sum teir síggja møguleika í at menna, sigur Jákup.

Sostatt er talan ikki um nakra vanliga royndarvenjing, har leikarin í eina viku ella so skal prógva, at hann er tann rætti hjá felagnum, men heldur er talan um eina ferð, har báðir partar kunnu læra hvønn annan at kenna, soleiðis at vitan fæst um, hvussu gróðralíkindini fyri einum framtíðar samstarvi eru.

Og hesum viðvíkjandi er Jákup í Stórustovu sær sjálvum líkt púrasta kúrrur.

- Hvat verður burturúr hesum, kann eg slettis ikki úttala meg um. Tað má tíðin bara vísa, eru einastu viðmerkingarnar til hetta.

# Súkklulandsliðið er sett

**Seinastu úttøkukappingarnar hjá súkklulandsliðnum hava verið, opg nú er greitt, hvørjir fimm súkklarar skulu umboða Føroyar á komandi oyggjaleikunum.**

SÚKKLING
*Jákup Mørk*



*Uttøkukappingin hjá súkklulandsliðnum er nú liðug, og gjørt er av, hvørjir teir fimm verða, skulu umboða Føroyar á komandi Oyggjaleikunum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Eingin Rógvi Johansen verður á føroyska súkklulandsliðnum til komandi oyggjaleikir, og tí er lítið at ivast í, at størstu vánirnar um heiðursmerki verða knýttar at Boga Kristiansen, sum á seinastu leikunum vann bronsu í býarkoyringini.

Eftir úttøkukappingarnar er greitt, at Bogi fær tveir av teimum meira royndu føroysku súkklarunum í sín part, meðan tveir aðrir mugu sigast at vera rættiliga fekskri í so máta. Teir báðir royndu eru Gunnar Dahl Olsen og Sverri Mohr Edvinsson, sum báðir hava umboðað Føroyar fyrr, meðan Eli Christiansen og Jens Sigurð Simonsen eru púrasta nýggir í hesum høpi. Frá súkklusambandinum verður sagt, at úttøkan av teimum báðum nýggju monnunum samstundis er ein liður í at venja teir báðar til framtíðar avbjóðingar.

Tað er tó ikki bert fyri at fáa nýtt blóð inn, at hetta verður gjørt. Úrslitini hjá teimum báðum sýna heilt greitt, at tað kanska ikki verður so leingi, áðrenn teir av álvara kunnu hótt teir meira etableraðu súkklararnar, og so er einasti spurningurin, hvørt teir áhaldandi fara at leggaj eins nógv í venjingina, soleiðis at menningin kann halda fram komandi árini eisini. Undir øllum umstøðum átti ein landsliðsúttøku at viðvirka til at skumpa undir hugin, og hartil eiga royndirnar, sum ein Oyggjaleikaferð gevur, ivaleyst eisini at koma teimum til góðar seinni.

Umframt venjingarnar her heima, fer súkklulandsliðið í komandi mánaði til Danmarkar á venjingarlegu, og ivaleyst verður meira at frætta frá teimum til ta tíð.

Úrslitini av teimum trimum úttøkukappingunum framganga annars niðanfyri.



# Eyðstein Jacobsen vann Ársins Songrødd

*2. páskakvøld var innleiðandi umfar í Ársins Songrødd í Hvalba*
*Nummar 1 var Eyðstein Jacobsen, Hvalba, nummar 2 var Annika Bech, Tvøroyri. Hini, sum sungu, vóru: John Holm, Hvalba, Johild Thomsen, Hvalba og Vígdis Berg, Hov*





## VIÐMERKINGAR

# Viðmerkingar til greinina "Hvar eru kommunufeløgini?"

**Vegna Føroya Kommunufelag**
*Mia Pedersen, formaður Føroya Kommunufelags*

Finnleif Guttesen fýlist í grein síni í seinastu viku á, at kommunufeløgini framhaldandi finna seg í, at landið áleggur kommununum eyka útreiðslur og samstundis minkar um inntøkumøguleikarnar hjá kommununum. Somuleiðis sigur hann at einki kommunufelag við virðing fyri sær sjálvum kann finna seg í hesum.

Finnleifi Guttesen til kunningar, hevur Føroya Kommunufelag ferð aftaná ferð gjørt vart við hendan trupuleikan. Í fyrsta lagi sum skrivligt svar, í samband við at uppskot frá landsstýrinum eru send felagnum til hoyringar. Í øðrum lagi hevur Føroya Kommunufelag biðið um fundir við millum annað trivnaðar- og fíggjarnevnd Føroya Løgtings. Tá ið hetta onga ávirkan hevur haft, hevur Føroya Kommunufelag til seinast gjørt vart við trupulleikan í fjølmiðlunum.

Føroya Kommunfelag kann bert svara fyri seg sjálvan, men staðfestast kann at Føroya Kommunufelag á ongan hátt góðtekur, at Føroya Løgting lóggevur niður í kommunukassarnar eftir peningi, uttan í samráð við kommunurnar.

Somuleiðis kann staðfestast at landið ikki leggur lunnar undir nakað fyrimyndarligt samstarv, tá ið samráðingar ímillum land og kommunur viðvíkjandi eldraøkinum í næstum fara í gongd.

# Kunngerðir um flyting av loyvum og fiskidøgum

**Tíðindaskriv**
*Fiskimálaráðið*

Í Kunngerðablaðnum, sum kom út um vikuskiftið, lýsir Fiskimálaráðið tríggjar nýggjar kunngerðir um flyting av loyvum og fiskidøgum.

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum boðaði herfyri frá, at øll avgreiðsla av málum um samanlegging av veiðiloyvum og avhending av fiskidøgum varð útsett til kunngerðirnar á økinum vóru endaliga lýstar og settar í verk.

Kunngerðirnar, ið nú eru lýstar, eru um flyting av veiðiloyvum, avhending av fiskidøgum og flyting av fiskiloyvum millum smærru útróðrarbátarnar.

**Kunngerð um flyting av veiðiloyvum**

Ein av nýggju kunngerðunum, sum nú er lýst, er um mannagongdir og áseting av fiskiorku í sambandi við flyting og samanlegging av veiðiloyvum hjá fiskiførum 15 tons og størri, sum eru undir dagaskipanini undir Føroyum.

Eftir lógini um vinnuligan fiskiskap kann veiðiloyvi verða flutt á fiskifar við ongum veiðiloyvi ella lagt saman við fiskifari við veiðiloyvi. Somuleiðis kunnu tvey veiðiloyvi verða flutt á fiskifar við ongum veiðiloyvi.

Treytin fyri at flyting kann fara fram er, at fiskiorkan ikki verður størri enn frammanundan.

Grundarlagið undir áseting av fiskiorku hjá fiskiførum, ið royna við húki er „Longd x breidd x dýpd" og fyri fiskifør, ið royna við troli „longd x breidd x dýpd x maskinorka"

Veiðiloyvi og fiskidagar kunnu ikki flytast frá húki til trol og øvugt.

**Kunngerð um avhending av fiskidøgum**

Kunngerðin fevnir um avhending av fiskidøgum millum fiskifør 15 tons og størri í høvuðsbólkunum 2, 3 og 4 undir fiskidagaskipanini á føroysku landleiðunum.

Eftir kunngerðini kunnu fiskifør í bólki 2 og bólki 4, ið royna við troli avhenda fiskidagar sínámillum, meðan fiskifør, ið bólkunum 3 og 4, ið royna við línu kunnu avhenda fiskidagar sínámillum, fyri eitt ár í senn ella endaliga.

Við atliti at fiskiorku er partrolaraflotin býttur í tríggjar undirbólkar eftir stødd og maskinorku. Trolbátarnir eru býttir í tvey eftir maskinorku. Línuskip eru í einum bólki fyri seg. Útróðrarflotin størri enn 15 tons, ið roynir við línu ella snellu, er býttur í fýra undirbólkar eftir stødd.

Høvuðsreglan er, at fiskidagar kunnu ikki avhendast millum húk og trol og øvugt.

Tá tríggir mánaðir eru eftir av fiskiárinum, kunnu fiskidagar tó flytast millum fiskifør í høvuðsbólkunum 2 og 3, t.e. línuskip og partrolarar.

Tá fiskidagar verða fluttir millum fiskifør, verður talið av døgum, ið kann flytast, umroknað. Í kunngerðini er talva við umrokningarvirðum, sum vísa lutfalsliga virðið á fiskidøgum millum bólkar av fiskiførum.

**Kunngerð um flyting av fiskiloyvum hjá útróðarbátum undir 15 tons**

Tann triðja kunngerðin er um flyting av fiskiloyvum hjá útróðrarbátum undir 15 tons í bólki 5.

Fiskiloyvi kann verða flutt á bát við ongum fiskiloyvi ella tvey fiskiloyvi kunnu verða flutt á bát við ongum fiskiloyvi.

Treyt er, at fiskiorkan ikki verður størri. Grundarlagið undir áseting av fiskiorku fyri útróðrarbátar undir 15 tons er „longd x breidd x dýpd".

Lagt kann verða afturat, at eftir lógini um vinnuligan fiskiskap, kunnu bátar undir 15 tons í bólki 5 ikki avhenda fiskidagar fyri eitt ár í senn ella endaliga.